

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 11 - 2012

# Oljuvinna við Lofoten kann geva 37.000 arbeiðspláss

Gera teir norsku politikararnir av at fara undir oljuvinnu við Lofoten og Vesterålen, kann tað sambært olju- og orkumálaráðharranum, Ola Borten Moe, geva 37.000 nýggj arbeiðspláss tey næstu 30 árini. Hetta upplýsti ráðharrin, tá hann nú um dagarnar kunnaði um tað, sum kann koma burtur úr einari møguligari oljuvinnu í umráðnum. Hann segði, at við lítlum virksemi fer vinnan at geva umleið 13.000 arbeiðspláss, men at talið kann koma heilt upp í 37.000, um virksemið verður stórt. -Tað fer at síggjast aftur í øllum liðum í samfelagnum frá oljuvinnuni sjálvari til ferðavinnu og tænastuvinnur. Sum heild hevði tað verið ein stórur vakstrar- og menningarmøguleiki hjá øllum umráðnum, segði Ola Borten Moe við NRK. Í stjórnini umboðar hann Miðflokkin, sum er ímóti at fara undir oljuvirksemi við Lofoten. Í øllum førum skal ein kanning fyrst staðfesta, hvørjar avleiðingar tað kann fáa fyri Lofoten og Vesterålen, um avgjørt verður at fara undir oljuvinnu har. Og fyrr enn tann frágreiðingin er komin, hendir einki. ? ?